MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað starv sum einalærari í Tjørnuvík

Starvið sum einalærari í Tjørnuvíkar skúla verður lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2011 – 31. juli 2012.

**Um størvini**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum. Starvið er fulltíðarstørv og tíðaravmarkað skúlaárið 2011/12.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**

- skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal virka fyri í samstarvi við foreldrini, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 7. juni 2011.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044 ella í teldubrævi til jenny@mmr.fo

*Tórshavn, 19. mai 2011*
***Mentamálaráðið***

*Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*

Starvslýsing

Leyst størv í Nærverkinum

## Dagstovnurin Reiðrið søkir starvsfólk

Søkt verður eftir einum starvsfólki at byrja 1. august2011. Starvið verður sett við einum vikuligum tímatali uppá 27 tímar.

Vit ynskja at tú hevur viðkomandi útbúgving, s.s. sjúkrarøktarfrøðingur, námsfrøðingur, heilsurøktari, ergoterapeutur, fysioterapeutur e.a.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:
Hannu Juul, leiðara á tlf 765311

**Umsóknarfreist:** 6. juni 2011.

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara:
www.naerver.fo/leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ
www.naerverk.fo
Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

Fuglafjarðar Kommuna

# Frá Fuglafjarðar býráð

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2011-2012 verða biðin um at senda mentamálanevndini skrivliga umsókn í seinasta lagi mikudagin 08. juni 2011.

*Fuglafjørður, tann 18. mai 2011*

**Fuglafjarðar býráð**
**Mentamálanevndin**

## Starvslýsing eftir námsfrøðingum til Dagstovnin við Stórá

**Søkt verður eftir námsfrøðingum til Dagstovnin við Stórá at byrja 15 aug 2011. Námsfrøðingar sum verða útbúðnir í jan/februar, kunnu eisini søkja.**

Dagstovnurin liggur í Rituvík og er stovnur undir Runavíkar kommunu. Stovnurin er normeraður til 70 børn í aldrinum 5 – 7 ár. Umleið helvt um barnagarðsbørn og frítíðarskúlabørn.

- Starv á stovu við frítíðarskúlabørnum úr fyrsta flokki. Starvið inniber at vera stuðul hjá barnið við ADHD. Starvið er 20 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er ímillum kl 12.00 – 17.00. Starvið er tíðaravmarkað frá 15.08.2011 til 06.07.12
- Starv á stovu við frítíðarskúlabørnum. Starvið er sett til 25 t um vikuna og er arbeiðstíðin ímillum kl 12.00 – 17.00
- Starv á barnagarðstovu. Starvið er farloyvisstarv og er tíðaravmarkað frá 15.08.11 – 16.07.12. Starvið er 30 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er skiftandi ímillum kl 07.30 – 17.00
- Starv á barnagarðstovu. Starvið er farloyvisstarv og er tíðaravmarkað frá 15.08.11 – 16.07.12. Starvið er 30 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er skiftandi ímillum kl 07.30 – 17.00
- Starv á barnagarðstovu (Skákinum). Starvið er 30 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er skiftandi ímillum kl 07.30 – 17.00

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Er áhugaður at arbeiða við børnum í aldrinum 5 – 7 ár
- Er íðin, nærlagdur og álítandi
- Hevur góð samstarvsevnir
- Hevur umsorgan og virðing fyri børnunum og vaksnum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya á lønarstigi 11-18

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera Runavíkar kommunu í hendi ,innan mikudagin 01 juni Runavíkar kommuna. Heiðavegur 26. 600 Saltangará

Nærri fæst at vita um størvini, við at venda sær til Jørgin Olsen leiðara tlf 216630


Fjeppari?
Les um ítrótt
í Sosialinum





Lesið Sosialin so eru tit við